# Framsýningarferð við Skálabergi

**Týsmorgunin var Skálaberg á framsýningarferð fyri innbodnum. Í allarfagrasta veðri á einum túri, ið vardi um tríggjar tímar, sluppu gestirnir at uppliva stásiliga nýggja trolaran**

SKÁLABERG
*Rúna Sivertsen*

**Klaksvík:** Um gott tíggjutíðina týsmorgunin fór Skálaberg av Klaksvík á framsýningarferð fyri innbodnum. Umframt gestir frá ymiskum stovnum, vóru eisini umboð fyri býráð, løgting og landsstýri við á ferðini.

Leiðin gekk norður gjøgnum Kalsoyarfjørð, suður gjøgnum Djúpini, inn á Fuglafjørð - og síðani aftur á Klaksvík.

Eftir at reiðarin hevði bjóðað vælkomin umborð, var ábit at fáa í messuni. Síðani vóru gestirnir vístir runt skipið, líka frá lastini og upp á brúnna.

## Flaggskip norðinga

Torleif Sigurðsson handaði vegna Klaksvíkar Býráð standmyndina av Kjølbro, í pinkustødd. Hann segði, at Skálaberg altíð hevði verið stoltleikin hjá klaksvíkingum, og hevur verið mettur sum flaggskipið her.

Formaðurin í nevndini hjá JFK-Trol, Leif Abrahamsen, segði eisini nøkur orð. Eitt nú segði hann, at tá tú byggir nýtt skip, mást tú hyggja 30 ár fram í tíðina. Hann vísti á, at nógvir av teimum, sum koma at búleikast umborð á hesum nýggja trolara, ikki eru føddir enn.

Víðari segði hann, at í framtíðini fer ikki bert at verða spurt um úrtøku, men eisini um, hvat reiðaríið kann bjóða umframt.



*Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, var millum gestirnar á Skálbergi týsmorgnunin. Tað er ikki ilt at gita, hvat teir báðir, stjórin á JFK-Trol, Hanus Hansen og hann munnu tosa um*

*Mynd: Rúna Sivertsen*








*Við messuna eru tvær stovur. Tann størra er til teirra, ið ikki roykja, hina minnu mugu tey, ið roykja lata sær lynda. Undarligi fótbúnin hjá Steintóri eru plastikgalosjurnar, sum allir gestirnir máttu lata seg í, fyri at verja snøggu gólvini umborð*





*At reiðaríið hevur raðfest trivnaðin hjá manningin høgt er týðiligt. Ikki bert arbeiðsumstøðunar er hugsað um, tá skipið varð bygt, men eisini rúmini, har fólkið skal búleikast í frítíðini. Umframt útvarp, sjónvarp og køliskáp, er eisini vesi og brúsa á hvørjum kamari*

*Mynd Jens Kristian Vang*

## Trivnaður týdning

At reiðaríið hevur raðfest trivnaðin hjá manningin høgt er týðiligt. Ikki bert arbeiðsumstøðunar er hugsað um, tá skipið varð bygt, men eisini rúmini, har fólkið skal búleikast í frítíðini

Umframt útvarp, sjónvarp og køliskáp, er eisini vesi og brúsa á hvørjum kamari.

Messan er serstakliga hugnalig við málningum á vegginum og gardinum fyri vindeyguni. Við messuna eru tvær stovur, tann størra til tey, ið ikki roykja. Hina minnu mugu tey, ið roykja lata sær lynda. Stovurnar eru hugnaligar og eisini har ber til at stytta sær stundir við einum filmi.

Eisini kann manningin venja vøddarnar í kondirúminum, ella hita seg í saunanum. Tá tað er gjørt, ber til at seta seg við telduna at skriva nøkur orð til tey har heima, ella at venja heilasellurnar við telduspølum.

## Umstøðurnar tó ikki alt

Arbeiðsumstøðurnar eru eisini serstakliga góðar umborð. Fabrikkin er av mest framkomnu. Trolarin hevur 4 spøl og banar, við møguleika fyri at fiska við trimum trolum í senn.

Eisini kokkarnir fáa bestu arbeiðsumstøður. Gallan er rúmlig, ljós og arbeiðslig, við øllum teim hentleikum, sum hoyra einum nútímans køki til.

Og á brúnni - hjá teimum, sum alt stendur og fellur við, skiparanum og stýrimanninum, finnast eisini øll tey tól, ið marknaðurin hevur at bjóða, soleiðis at teir skulu kunna fáa sum mest av fiski burtur úr sjónum.

Men hóast hetta framkomna skip, sum sigst vera eitt av heimsins størstu fiskiskipum, skiltist á røðuni hjá stjóranum á JFK-Trol, at álitið ikki bert verður sett á tað, men sanniliga eisini á hann, sum yvir øllum valdar.



*Manningin kann venja vøddarnar í kondirúminum, ella hita seg í saunanum. Tá tað er gjørt, ber til at seta seg við telduna at skriva nøkur orð til tey har heima, ella at venja heilasellurnar við telduspølum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*




Bilpakkar Summarsiglingin 2003

Tórshavn - Hanstholm ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 4.900 | 5.580 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.920 | 4.960 | 5.600 | - | - | 7.120 |
| Bilur + 3 fólk | 3.220 | 4.000 | - | 4.780 | 5.200 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.520 | 3.040 | - | - | - | 4.120 |
| Bilur + 1 fólk | 1.720 | 1.960 | - | - | - | 2.520 |

| Háárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 6.600 | 7.380 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 5.280 | 6.560 | 7.520 | - | - | 9.440 |
| Bilur + 3 fólk | 4.340 | 5.300 | - | 6.380 | 6.980 | - |
| Bilur + 2 fólk | 3.380 | 4.020 | - | - | - | 5.460 |
| Bilur + 1 fólk | 2.300 | 2.620 | - | - | - | 3.360 |

Tórshavn - Bergen ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 3.600 | 4.400 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.880 | 3.520 | 4.000 | - | - | 4.800 |
| Bilur + 3 fólk | 2.320 | 2.800 | - | 3.280 | 3.520 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.760 | 2.080 | - | - | - | 2.720 |
| Bilur + 1 fólk | 1.160 | 1.320 | - | - | - | 2.000 |

| Háárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 4.600 | 5.800 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.680 | 4.640 | 5.280 | - | - | 6.240 |
| Bilur + 3 fólk | 3.000 | 3.720 | - | 4.320 | 4.800 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.280 | 2.760 | - | - | - | 3.560 |
| Bilur + 1 fólk | 1.520 | 1.760 | - | - | - | 2.160 |

Tórshavn - Lerwick ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 2.500 | 3.100 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.000 | 2.480 | 2.880 | - | - | 3.520 |
| Bilur + 3 fólk | 1.640 | 2.000 | - | 2.420 | 2.660 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.280 | 1.520 | - | - | - | 2.040 |
| Bilur + 1 fólk | 880 | 1.000 | - | - | - | 1.260 |

| Háárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 3.300 | 4.200 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.640 | 3.360 | 3.760 | - | - | 4.640 |
| Bilur + 3 fólk | 2.180 | 2.720 | - | 3.200 | 3.500 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.700 | 2.060 | - | - | - | 2.700 |
| Bilur + 1 fólk | 1.160 | 1.340 | - | - | - | 1.680 |

Tórshavn - Seyðisfjørður ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 4.200 | 5.000 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.360 | 4.000 | 4.560 | - | - | 5.760 |
| Bilur + 3 fólk | 2.740 | 3.220 | - | 3.880 | 4.240 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.100 | 2.420 | - | - | - | 3.300 |
| Bilur + 1 fólk | 1.400 | 1.560 | - | - | - | 2.000 |

| Háárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 5.700 | 6.600 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.560 | 5.280 | 6.080 | - | - | 7.680 |
| Bilur + 3 fólk | 3.700 | 4.240 | - | 5.140 | 5.620 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.840 | 3.200 | - | - | - | 4.400 |
| Bilur + 1 fólk | 1.880 | 2.040 | - | - | - | 2.660 |

Treytin fyri omanfyrinevndu bilpakkum
er at ferðin byrjar og endar í Føroyum.



SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345900
Telefax +298 345950
booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo